UTTAN ÚR HEIMI

## Stríðið fyri friði heldur fram

Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, lovar at halda fram við arbeiðinum fyri friði, sleppur hann at skipa stjórn aftan á tjóðartingsvalið, sum verður tann 28. mars.

Talsmaður hansara, Meir Sheetrir, sigur við tíðindastovuna AP, at Kadima (nýggi flokkurin hjá Sharon) fer at halda fram við friðarsamráðingunum við palestinar og at virka fyri, at samráðingarnar enda við einum landamarki ímillum Ísrael og Palestina.

-Skulu vit fáa varandi frið, mugu ísraelsmenn og palestinar hava hvør sítt ríki, sigur talsmaðurin hjá Sharon.

Í síðstu viku fór Sharon burtur úr Likudflokkinum, tí hann kendi seg sannførdan um, at hann kundi ikki fáa meirilutan í flokkinum at taka undir við ætlanini um eitt palestinskt ríki. Síðani stovnaði Sharon nýggjan flokk, og fleiri týðandi limir í Likudflokkinum gjørdu av at fara upp í tann nýggja flokkin.

## Burtur við lyftinum

Norski løgfrøðiprofessarin Hege Brækhus heldur tað vera skeivt at krevja av einum brúðarpari, at tey skulu verða hvør øðrum trúgv, til deyðin ger skilnað teirra millum. Hon vísir á, at trúskapur snýr seg um kenslur, og teimum kann ein ikki stýra við viljanum, sigur hon.

Professarin sigur við Aftenposten, at hjá nógvum hjúnum eru pengar orsøkin til, at tey halda saman. Serliga kvinnur, sum eiga barn ella børn, kenna seg fíggjarliga bundnar at manninum, og tað heldur professarin vera eina óvirðiliga støðu.

Hege Brækhus, sum dagliga starvast á lærda háskúlanum í Tromsø, heldur, at vit eiga at broyta hjúnarbandið sum skipan. Hon sigur seg vera sannførda um, at tað hevði givið kærleikanum í hjúnarbandinum størri rúmd.

## Her er ikki hungursneyð

Fleiri altjóða hjálparfelagsskapir vilja vera við, at fleiri milliónir fólk í afrikanska landinum Niger líða hungur, men nú avsannar stjórnin tíðindini.

Ary Ibrahim, heilsumálaráðharri, sigur við Reuter, at frágreiðingarnar um hungursneyð hava bara til endamáls at skaða umdømi landsins, og hann leggur afturat, at gevast felagsskapirnir ikki við at bera slík ósannindi, verða teir koyrdir av landinum. Sambært ráðharranum hevur landið havt ávísar trupulleikar við at útvega nóg mikið av mati, men at trupulleikarnir eru loystir.

Matvørustovnurin hjá ST, WFP, segði í síðstu viku, at fleiri milliónir fólk í Niger fara at líða hungur, um altjóða samfelagið ikki veitir landinum hjálp.

## Tjóðsangur í nýggjum hami

Tá norski forsætisráðharrin, Jens Stoltenberg, er liðugur við ta árligu nýggjársrøðuna nú um ársskiftið, sleppa norðmenn at hoyra eina nýggja útgávu av tjóðsanginum „Ja, vi elsker".

Tey seinastu sjey árini hevur eitt manskór hjá studentafelagnum sungið ta almennu útgávuna av tjóðsanginum, men nú hevur norska kringvarpið gjørt eina nýggja upptøku við einum solistakóri, har bæði menn og kvinnur syngja. Anne Røtting hjá kringvarpinum sigur, at upprunaliga varð tjóðsangurin skrivaður til manskór, og at tað var eitt kór við 24 monnum, sum sang hann fyrstu ferð á Eidsvold í 1864.

- Men at tað nú verður hildið rætt og rímiligt at lata kvinnurnar syngja eisini, sigur hon.

Tað var kenda skaldið Bjørnstjerne Bjørnson, sum yrkti „Ja, vi elsker", og Rikard Nordraak gjørdi lagið.



*Sambært Iyad Allawi verða mannrættindini líka lítið vird í Irak nú sum undir Saddam Hussein*

# Irak verri nú enn undir Saddam Hussein

**Iyad Allawi, sum amerikanararnir settu til fyribilsforseta í Irak, sigur, at mannarættindini eru líka lítið vird í Irak nú sum undir stýrinum hjá Saddam Hussein**

IRAK

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

-Tað, sum hendir í Irak nú, er líka ringt og kanska verri enn tað, sum hendi undir gamla stýrinum, sigur Iyad Allawi við bretska blaðið The Observer. Hann vil vera við, at shiamuslimskir leiðarar, sum nú sita í stjórnini, hava stovnað serlig drápslið og serlig fongsul, har fólk verða pínd.

- Tað vóru júst slík drápslið og píning, sum gjørdu, at vit settu okkum upp ímóti Saddam, men nú hendir tað sama, sigur Allawi.

Fyrr í hesum mánaðinum avdúkaðu amerikanskir hermenn eitt loyniligt fongsul í kjallaranum í einum húsum hjá innanríkismálaráðnum mitt í sjálvum Bagdad. Tað var týðiligt, at teir flestu av teimum 170 fangunum høvdu verið píndir.

Í samrøðuni við The Observer sigur Allawi:

- Nógvir irakar verða píndir ella dripnir undir avhoyringum. Vit hava eisini sæð, at Sharia-dómstólar, sum døma eftir islamskari lóg, draga fólk fyri rættin og avrætta tey. Hesi mugu missa sítt vald beinanvegin, og teir, sum hjálpa teimum, mugu avvápnast.

Tær lemjandi atfinningarnar koma George W. Bush, forseta illa við, tí hann er undir hørðum trýsti í USA orsakað av krígnum í Irak. Tað ljóðar úr Washington, at forsetin umhugsar at taka 40.000 hermenn úr Irak næsta ár, tí tað sambært honum gongur tann rætta vegin í landinum. Men sambært The Observer eru umleið 30.000 irakar deyðir í samanbrestum og yvirgangi, síðani Saddam Hussein varð rikin frá. Sjálvur kennir Iyad Allawi seg so ótryggan, at hann hevur givið sínum lívverjum boð um at skjóta, um løgreglubilar koma ov nær húsum hansara uttan at hava fingið loyvi til tess.

Nú ætlar hann at stilla upp til valið tann 15. desember, og hann vónar at endurvinna forsætisráðharrasessin, sum hann misti á valinum í januar. Eygleiðarar í London siga, at atfinningar hansara at stýrinum eru tí ivaleyst partur av valstríðnum.

# Ríkiskassin flýtur í pengum

**Men pengarnir skulu ikki brúkast til skattalætta**

DANMARK

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Í næstu viku fer danski fíggjarmálaráðharrin, Thor Pedersen, at almannakunngera eina framrokning, sum vísir gongdina í ríkiskassanum.

Tað er lítið at ivast í, at hann verður í góðum hýri tann dagin, tí í einari frágreiðing, sum hann sendi fíggjarnevndini hjá Fólkatinginum fyrradagin, stendur, at næsta ár verður avlopið 9 milliardir krónur størri, enn stjórnin hevur mett í fíggjarlógaruppskotinum. Tað merkir, at avlopið næsta ár verður heilar 49 milliardir krónur.

Danmark hevur havt avlop á fíggjarlógini í fleiri ár, men pengarnir verða ikki brúktir til skattalætta - ikki enn í hvussu er. Ístaðin fyri hava politikararnir valt at gjalda skuldina hjá tí almenna, og tað eigur stjórnin framvegis at gera, sigur landsins størsti banki, Danske Bank.